Frítíðarheimið í Skrivaragøtu 25 ár

– Í hesum sambandi verður peningur savnaður til tess at keyap nýggjan buss

25 ÁRA DAGUR
Tíðindaskriv

Tann 1. desember í ár verða liðin 25 ár síðani, at Frítíðarheimið í Skrivaragøtu í Havn lat upp. Frítíðarheimið virkar í dag sum umlættingarheim hjá menningartarnaðum.

Í sambandi við dagin, verða ymisk tiltøk á skránni. Byrjað verður kl 14 á Vón á Argjum. Har verður m. a. kaffisøla við heimabakaðum køkum, uppboðssøla av málningum, sum menningartarnað hava gjørt, tombola, fiskibrunnur, lutaseðlasøla, hoppiborg og framsýning av fotomyndum frá Frítíðarheiminum.

Avlop frá tiltakinum, sum endar kl 17, fer til nýggjan buss til Frítíðarheimið.

Um kvøldið kl. 18 verður veitsla í Handilsskúlanum við Marknagilsvegin.

Tey, sum ynskja at koma í veitslu, skulu gjalda 200 kr. á kontonr. í Føroya Sparikassa 137.436.4 í seinasta lagi 11.

Ljósasløkkjarar

Tað frættist frá Dáva
nú hava teir snávað
og ljós ei í tunnilin fáa
hann stendur og glanir
tí tað vóru danir
sum ei mundu setningi náa

Sum sligin á nevið
ei Klæmint úr sevi
man rakið til koluna finna
teir vita ei nakað
til ráða at taka
og trupulleikum á vinna

Hjá fólki í Vágum
teim stóru sum smáum
tað heila nú fór út av lagi
tey í hava leikað
og fyri seg reikað
at hátíðarhalda tann dagin

Ein hvøkk tey nú fingu
tí boðini ringu
so tvørt komu fyri hjá øllum
tey halda seg vita
í myrkri teir sita
og kanska við fleir' jólatrøllum

edvard

Skuffað vágafólk

Tað kom sera óvart á fólk í Vágum, at Vágatunnilin ikki letur upp sum ætlað, tann 26. november klokkan 11. Felagskommunan í oynni hevur í longri tíð fyrireikað fleiri tiltøk í samband við at tunnilin verður tikin í nýtslu, og vinnulív og handlarnir hava eisini bíðað í spenningi sigur Jónhild Jørgensen, forkvinna í Felagskommununi í Vágum

Glað vágafólk til hátíðarhald, tá seinasta skotið varð latið av í undirsjóvartunnlinum. Tey vistu tá, at dagurin 26. november klokkan 11 fór tunnilin at verða tikin í nýtslu. Tí fingu tey sum vátan frammaná, nú tað vísir seg, at tunnilin kortini ikki verður liðugur til henda dato. Ein ábending um, nær vágatunnilin verður liðugur, fæst væntandi eftir fundin millum P/F Vágatunnilin, NCC og KB El-Teknik, sum verður seinnapartin týsdagin

VÁGATUNNILIN
Jón Brian Hvidtfeldt

Vágafólk fingu sum vátan frammaná, tá tey fríggjadagin fingu at vita, at Vágatunnilin ikki verður liðugur til ásettu tíð, so hann kann takast í nýtslu 26.november klokkan 11. Kommunurnar í Vágum høvdu ikki so mikið sum fingið eina ábending um at tunnilin ikki fór at lata upp kortini, áðrenn tað frættist í fjølmiðlunum seinnapartin fríggjadagin. Og tað er ov vánaligt, heldur Jónhild Jørgensen, forkvinna í Felagkommununi í Vágum.

– Eg haldi at tað er ótrúliga óprofessionelt, at leiðslan í partafelagnum tíðliga í summar alment setur dato og klokkuslett á, nær tunnilin letur upp, og so frættist einki aftur fyrr enn nú ein mánað áðrenn tunnilin skal lata upp. At fáa hetta at vita nú er ótrúliga skuffandi, sigur Jónhild Jørgensen.

Forkvinnan í Felagskommununi í Vágum sigur, at síðan leiðslan í P/F Vágatunnilin í summar setti nýggjan dato á, nær tunnilin letur upp, hevur at kalla øll oyggin fyrireikað seg til hetta. Hon vísir á, at í summar varð eitt fólk sett at samskipa øll tey tiltøk, sum eftir ætlan skuldu vera, tá tunnilin letur upp. Hesin samskipari hevur síðan havt fleiri fundir við P/F Vágatunnilin, uttan at tað nakrantíð hevur verið nevnt, at tunnilin møguliga ikki letur upp tann 26. november kortini.

Jónhild Jørgensen sigur, at ætlanin var at hava mentanartiltøk, tónleikatiltøk og átrúnaðarlig tiltøk í samband við ta stórhending, sum fasta sambandið um sundið er fyri vágafólk. Eisini hava handlarnir í Vágum fyrireika seg til at hava leingi opið vikuna, tunnilin letur upp.

Ringast fyri vinnulívið

Jónhild Jørgensen heldur, at tað kemur ringast við hjá vinnulívinum í oynni, at vágatunnilin kortini ikki letur upp tann 26. november. Hon sigur, at dagliga eru langar bíðirøðir til at sleppa við Ternuni um Vestmannasund. Fyri vinnulívið merkja bíðirøðirnar mista inntøku, og tí vóru tíðindini í summar um, hvussu skjótt arbeiðið gekk og framskundaði dagurin, tá arbeiðið var liðugt, góð at fáa hjá vinnuni, sum síðan hevur bíðað í spenningi eftir 26. november. Men fyribils noyðist vinnan at brynja seg við toli, og liva við longu bíðirøðunum.

Fund týsdagin

Dávid Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunnilin, veit framvegis ikki at siga, nær tunnilin verður liðugur. Seinnapartin týsdagin skal leiðslan í P/F Vágatunnilin á fund við umboð fyri NCC og KB El-Teknik, og ikki fyrr enn eftir tann fundin fæst greiða á, nær arbeiðið kann vera liðugt.

Knud Balle, stjóri í KB El-Teknik sigur, at hann væntar, at arbeiðið kann vera liðugt um ikki so langa tíð. Tað hevur verið frammi, at arbeiðið verður ikki liðugt áðrenn marts mánað næsta ár, men Knud Balle metir ikki, at tað fer at ganga so long tíð. Hann metir, at elarbeiðið, sum KB EL-Teknik skal gera, kann vera liðugt væl áðrenn marts mánað. Men eisini hann er varin við at siga nakað ítøkiligt, fyrr enn eftir fundin, sum altso skal vera seinnapartin týsdagin.